# ítróttur

Nr. 154 • mikudagur • 17. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gott at kenna kuldan



Hóast hann sigur seg hava ynski um at spæla á miðvøllinum, so staðfestir Súni Olsen, at hann er nøgdur, bara hann byrjar millum teir fyrstu ellivu

Mynd: Álvur Haraldsen

**Hjá útiestum er tað altíð nakað serligt, tá tú kemur aftur á klettarnar at vitja. Eisini hóast tað enn er so sera stutt fráliðið í útisetatilveruni**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Hóast hann bert hevur verið knýttur á danska AaB í á leið ein mánað í hesum umfarinum, so telist Súni Olsen nú aftur millum tað aftur vaksandi liðið av føroyskum spælarum, sum royna eydnuna í útlandinum.

Ofta verður tikið til, at tað hjá hesum spælarum er enn meira serligt at spæla á landsliðnum enn hjá teimum, sum dagliga eru í Føroyum. Og tað er eisini ein støða, sum Súni sigur seg kennast aftur við.

- Tað vil sjálvandi altíð vera nakað serligt at spæla á landsliðnum, og í øllum førum er tað nakað, sum eg sjálvur havi sett rættiliga høgt. Men tá tú spælir uttanlands, so er hetta samstundis ein kærkomin møguleiki at vitja eitt sindur heima. Og eg má siga, at tað kennist gott at vitja her í kalda veðurlagnum, fáa eitt sindur av føroyskum mati og yvirhøvur at vera í Føroyum, heldur hann.

### »Veiku« liðini

Mikudagin eru tað tó hvørki matur ella veður, sum er á skránni. Tá er tað dysturin móti Kypros, sum stendur fyri framman, og tað er uttan iva besti møguleikin - á pappírinum í øllum førum - um Føroyar skulu vinna sær ein sigur í hesari HM-undankappingini.

Tí er Súni sum so heldur ikki ósamdur í, men hann leggur samstundis dent á, at ein sigur á ongan hátt kemur av sær sjálvum.

- Tað hevur ofta víst seg, at tey vánaligastu avrikini hjá landsliðnum hava verið móti teimum »veiku« liðunum. Kanska er tað so, at fólk tá rokna okkum sum favorittar, sum ger, at vit tá hava tað so trupult. Í fótbólti er tað nú einaferð so, at tað er 0-0, tá dysturin byrjar, og so má hvør einasti spælari geva seg 100%, um nakað skal spyrjast burturúr, sigur hann, og vísir samstundis til trýstið, sum føroyska liðið var undir, tá javnleikurin á Kypros varð fingin til høldar.

### Todi er jokarin

Men umframt tað, at hvør spælari skal geva seg fult út. Hvat skal so til, um eitt gott úrslit skal røkkast mikudagin?

- Vit mugu sjálvandi royna at halda tætt í verjuni. Gera vit tað, so tapa vit í øllum førum ikki, kemur tað við einum smíli.

- Og so hava vit nú eisini Toda Jónsson, sum tykist vera sera væl fyri. Megnar hann at gera eitt mál, ella kanska skapa rúm fyri aðrar, so kann jú verða, at vit klára tað.

Nú nevnir tú Toda. Men har verður eisini neyðugt við øðrum umskipanum. Hvussu roknar tú við, at tað fer at ávirka liðið?

- Tað verður í øllum førum spennandi.Tað kann kanska merkja, at onkrar rokadur verða gjørdar, soleiðis at spælarar koma at spæla á plássum, sum teir trívast betri á.

Har hevur títt navn ofta verið nevnt. Roknar tú við, at tú á henda hátt kann sleppa á miðvøllin, sum tú ofta hevur sagt vera tín favoritt-leiklutur?

- Tað vóni eg sjálvandi, men tað fáa vit at síggja. Sjálvur eri eg í øllum førum glaður, bara eg sleppi at byrja inni.



*Súni fegnast um, at Todi Jónsson nú aftur er á landsliðnum*

# Bridgeskeið við Svend Novrup

BRIDGE
*tíðindaskriv*

Komandi bridgeár stendur nú fyri framman. Í hesum sambandi, hevur nevndin fyri Bridgehúsið í Havn gjørt avtalu við navnframa danan Svend Novrup, ið áður hevur verið landsliðsvenjari hjá føroyska landsliðinum í bridge, um at hesin kemur til Føroya í august, at hava skeið fyri teimum, sum hava áhugað fyri at betra um meldingarnar hjá sær.

Ætlanin er, at Svend skal hava tvey skeið.

19-20. august verður skeið í bókini ´"Major 5 farve", kostnaðurin verður 500 kr.

21. august verður skeið í "Roman Key Card Blacwood", kostnaður 300 kr.

Skeiðini eru sera vælegnað pørum, ið ikki hava spælt saman leingi, ella, sum vilja hava íblástur til at koma víðari. Bókin "Major 5 farve" er ein gjøgnum gongd av einum samlaðum nútímans systemi, við øllum teimum konventiónum, sum hartil hoyra. Svend Novrup hevur tikið systemið hjá fleiri av bestu pørinum í heiminum og gjørt eitt gott og einfalt system burtur úr teimum, ið kann nýtast av teimum flestu.

Skeiðið í "Roman Key Card Blacwood" er fyri allar bridgespælarar. Bæði teir, sum longu nú spæla við konventiónini, men vilja læra hana betur, og fyri teir, ið ikki nýta hana, og sum gjarna vilja læra at spæla við "Roman Key Cars Blacwood".

### Bridgetúrur til Hetlands við Norrønu

Aftur í ár skipað Smyril Line saman við Boga Simonsen fyri Bridgetúrið til Hetlands við Norrønu. Farið verður avstað hósdagin 22. september og komið verður aftur á Havnina mánamorgunin 26. september 2005.

Kostnaður fyri túrin er 1400 kr. Íroknað prísin er ferðin fram og aftur í 4 koyggjukamari við wc/bað. Hartil 2 nætur í dupultkamari á Shetland Hotel í Leirwick. Eykakostnaður er fyri einakamar.

Á túrinum verður skipað fyri fleiri kappingum móti hetlendingum. Bæði liðkapping, parakapping og staklingakapping. Hetlendingar skipað fyri einari útferð við bussi, soleiðis, at møguleiki verður at síggja nakað av Hetlandi.

Sum nakað nýtt, verður tað møguleiki fyri at spæla golf í Hetlandi. Royndur golf spælari úr Føroyum verður við á túrinum og fer at leggja teimum, ið hava hug til at spæla golf, lag á. Tveir góðir golfvallir eru líka við Leirwick.

Tilmelding til túrin ferð fram hjá Smyril Line, og tað er helst neyðugt at gera skjótt av, um vissa skal vera fyri, at rúm er eftir á ferðini.